betri pensjón

Fylgiskjal 5

Til Fíggjarmálaráðið

fmr@fmr.fo

Tórshavn, 06. oktober 2025
Jh-/

Hoyringssvar til lógaruppskotið til broytingar í Eftirlønarlógini (§ 1, nr. 12)

Vit takka fyri høvið at gera viðmerkingar til nevnda uppskot til broytingar í Eftirlønarlógini. Flestu broytingarnar hava vit ongar nevniverdar viðmerkingar til. Tó hava vit viðmerkingar til ætlaðu broytingarnar um tvungið útgjald av egnari pensjónsuppsparing við náddan almennan pensjónsaldur.

1. Um innihaldið í § 1, nr. 12

Sambært viðmerkingunum til § 1, nr. 12 er ætlanin at seta sum krav, at útgjald av egnari eftirløn skal byrja mánaðin eftir, at eftirlønarsamanspararin nær fólkapensjónsaldur sbrt. lóg um almannapensjónir, meðan tað framvegis skal vera møguligt at útseta fólkapensjónina til náddan persónligan pensjónsaldur (t.e. tá ein sjálvur velur at fara upp á pensjón).

2. Um grundgevingina fyri broytingini

Sum ein av orsøkunum verður sagt, at verandi áseting er ógreið og torfør at umsita fyri samanspararan, arbeiðsgevaran og eftirlønarveitaran. Víðari verður ført fram, at broytingin hevur tvey høvuðsendamál:

a) at gera ásetingina greiðari og umsitingarliga lættari, og

b) at tryggja, at eftirlønin kemur til útgjaldingar frá og við almenna pensjónsaldurinum.

Hesum eru vit ikki samd í, og verður serliga víst til grundgevingarnar fyri omanfyrinevndu høvuðsendamál a-b:

Ad. a)

Fyri okkara viðkomandi hevur tað ongan umsitingarligan týdning, nær ein samansparari velur at fáa sína eftirløn útgoldna. Verandi skipan er hvørki ógreið ella tvørlig. Hon gevur hinvegin samanspararanum rásarúm at velja útgjaldstíðspunkt eftir egnum tørvi.

Ad b)

Seinna høvuðsendamál skilja vit ikki rættiliga meiningina við. Um samanspararin framvegis arbeiðir ella av øðrum orsøkum hevur ráð at bíða, so megnar viðkomandi framvegis at forsyrgja sær sjálvum. Tað er júst henda

støðan, ið ger, at viðkomandi velur at útseta útgjald av egnari eftirløn. At tvinga útgjald í slíkum førum meta vit ikki hevur nakran veruligan fyrimun, hvørki persónliga ella samfelagsliga.

3. Samfelagsligar avleiðingar

Tað er ilt at síggja, hvussu tað gagnar samfelagnum at tvinga útgjald av egnari eftirløn, meðan fólkapensjónin framhaldandi kann útsetast. Heldur kann ein slík skipan hugsast at gerast dýrari fyri samfelagið, tí minni eftirløn verður efti, at mótrokna fólkapensjónina við, tá hon einaferð kemur til útgjaldingar. Hetta skal eisini metast í mun til, at fólkapensjónin hækkar fyri hvørt ár, hon verður útsett.

4. Rættindi hjá samanspararanum

Broytingin skerjir grundleggjandi rættin hjá samanspararanum sjálvum at gera av, nær egin uppsparing skal útgjaldast. Verandi skipan er hvørki ógreið ella tvørlig. Tvørturímóti hevur samanspararin møguleika fyri at renta samansparingina og soleiðis økja um hana, við at útseta útgjaldingina, eisini hóast samanspararin ikki rindar inn til eftirløn eftir náddan pensjónsaldur.

Tað er als ikki *neyðugt,* at útgjalda eina samansparing bert tí inngjøldini steðga, og tað hevur onga umsitingarliga ávirkan, sum tað annars verður sagt í viðmerkingunum til lógaruppskotið.

5. Samandráttur og tilmæli

Samanumtikið meta vit, at uppskotið til broyting:

1. ikki loysir nakran veruligan umsitingarligan trupulleika,
2. ikki styrkir møguleikan hjá fólki at forsyrgja sær sjálvum,
3. kann hava óhepnar fíggjarligar avleiðingar fyri samfelagið, og
4. skerjir rásarúmið hjá tí einstaka til at ráða yvir egnari samansparing.

Tí verður heitt á Fíggjarmálaráðið um at endurmeta broytingina í § 1, nr. 12 og varðveita verandi skipan, har einstaki samanspararin framhaldandi avgerð, nær útgjald av egnari eftirløn skal byrja.

Vinarliga

Betri Pensjón